# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Minningarorð um Martin Jacobsen

**f. 25.09.1951 – d. 21.09.2007**



Góði Martin

Tungt er at sita og skriva miningarorð um teg. Hóast vit vistu, at tú stríddist við svára sjúku, so varð tankin um, at vit kundu missa teg, skúgvaður til viks. Vit hava sæð teg í nógvum ringum løtum, men altíð komst tú víðari. Tú gav ongatíð upp. Tú gramdi teg ongantíð. Tað var sum hevði tú hangandi á tær eitt skelti, ið segði " Eg klári tað nokk". Altíð fanst tú eina leið víðari. Góði Martin, tú vart ein kempa.

Nógvar eru løturnar at minnast aftur á, tí vit hava upplivað so nógvar vælsignaðar løtur saman. Stuttligir vóru túrarnir um sumrarnar, tá vit saman við Katrini og tær og øllum okkara børnum fóru í leir at liggja í tjaldi. Vit fiskaðu og gingu nógvar trúrar.

Gjørdu bátar av mjólkarpakkum til børnini at sigla kapp við. Og ikki minst, hvussu vit hugnaðu okkum í tjaldinum um kvøldarnar. Har vórðu settir og svaraðir stórir spurningar og loystir líka stórir trupulleikar. Øll børn okkara nutu hugnan, og tí bera tey arvin víðari við teirra børnum. Og túrarnir á floti – hóast tú seinastu túrarnar mátti góðtaka at draga teir flesu sitandi á toftubekkinum.

Altíð var tað spennandi at tosa við teg. Tú kundi altíð finna ein annan vinkul at síggja tingini út frá. Tíni evni at síggja ljóst upp á lívið hjálptu tær eisini, so hvørt heilsan viknaði alt meira. Góði Martin, vit fara at sakna teg. Ein uggi er nú, at tú ikki líðir longur, at tú ert komin til ein betri stað, har eingin pína ella neyð er til.

Góða Katrin, Høgni, Tóra, Edith og Jóan Pauli, tit hava mist ein góðan mann, pápa og abba. Men tit hava nógv góð og stuttlig minni um hann, ið tit fara at gleðast um.

Má Harrin hjálpa tykkum at finna leið í sorgini á sama hátt, sum Hann hjálpti Martini gjøgnum lívið.

Vit vilja við hesum lýsa frið yvir minnið um Martin. Hann verður verandi í minni okkara.

**Hans Eli og Birna**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Olav Askildsen í Tórshavn** fer til gravar úr Ebenezer mikudagin klokkan 13. Bønarhald verður í Ebenzer í dag klokkan 15. Tey, ið vilja minnast Olav kunnu lata Kristnastovu eina peningagávu. Konta í peningastovnunum

**Martin Jakobsen**, ættaður av Glyvrum, fer til gravar úr Havnar Kirkju mikudagin kl.14. Bønarhald verður í Havnar Kirkju týsdagin kl. 17

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum,
at kæri maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Martin Jakobsen**
ættaður av Bakka á Glyvrum

andaðist fríggjadagin 21.september, 55 ára gamal.
Bønarhald verður í Havnar Kirkju týsdagin kl.17.
Jarðarferðin verður úr Havnar Kirkju mikudagin kl. 14.

*Familjunnar vegna*
**Katrin, Høgni, Tóra, Edith og Jóan Pauli**

**Dagurin**
**26. september. Adolf,** deyður umleið 824. Sonur muslimskan pápa og kristna móður í Sevilla. Flutti til Cordoba í vón um at hava kristnu trúgv sína í friði, men varð klagaður og tikin av døgum. Týskt navn ið merkir aðalborin, úlvur.

# Sølvi stjóri í Ferðslutrygd

**Sølvi Reinert Hansen hevur tikið við sum nýggjur stjóri í Ráðnum fyri Ferðslutrygd eftir Jón Kragesteen, sum hevur verið stóri seinastu mongu árini. Í hesum sambandið var móttøka á Hotel Hafnia mánadagin**

**MÓTTØKA:**
*Myndir Magnus Gunnarsson*



*Jón Kragesteen (h.m.) ynskir Sølva Reinert Hansen alt tað besta við nýggja starvinum*

Almenn móttka var á Hotel Hafnia mánadagin 24. september í sambandi við at Jón Kragesteen fer úr starvi og Sølvi Reinert Hansen hevur tikið við stjórastarvinum á Ráðnum fyri Ferðslutrygd.

Umframt nýggja og fráfarandi stjóran og formannin í Ferðslutrygd hildu eisini hesir røðu undir móttøkuni: Petur J. Sigvardsen, fyrrverandi formaður og heiðurslimur í Ferðslutrygd, Jón Klein Olsen frá politinum, og Bjarni Djurholm, landsstýrismaður.

Sølvi Reinert Hansen er 36 ára gamal. Hann hevur lisið søgu og danskt og hevur haraftrat undirvíst í miðnámsskúla, har hann samstundis var lestrarvegleiðari. Seinastu fimm árini hevur Sølvi Reinert Hansen verið ítróttaráðgevi hjá ÍSF.

Sølvi Reinert Hansen hevur síðan hálvan august arbeitt saman við fráfarandi stjóranum, Jón Kragesteen.

Tað er starvsnevndin í Ráðnum fyri Ferðslutrygd, sum hevur sett Sølva Reinert Hansen sum stjóra. Formaður í RFF er Høgni í Stórustovu.

**mg**



*Sølvi Reinert Hansen, nýggi stjórin í Ferðslutrygd, Høgni í Stórustovu, formaður í Ferðslutrygd, og Jón Kragesteen, fráfarandi stjóri*